Aalborg:

# Blómandi ítróttarlív í býnum

**Aalborg er ein býur við alskyns møguleikum, og eitt av teimum tingunum, sum veruliga hevur blómað síðstu árini, er ítróttarlívið í býnum. Bæði í fótbólti, hondbólti, íshockey og øðrum ítróttargeinum eru úrslitini hjá Aalborg fram úr**

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Aalborg, sum liggur út til Limfjørðin, er største býurin í Norðurjútlandi. Har búgva á leið 120.000 fólk, og tað eru bert tríggir býir í Danmark, nevniliga Keypmannahavn, Odense og Aarhus, sum eru størri enn Aalborg.

Altantic Airways hevur ikki altíð flogið til Aalborg, men í ár hava teir gjørt av, at hava tveir túrar til Aalborg um vikuna í summarhálvuni. Hetta gleðir helst nógvar føroyingar í Norðurjútlandi, tí talið av føroyingum í hesum økinum er stórt. Við teimum tveimum túrunum á Aalborg um vikuna verður helst lættari hjá øllum føroyingunum í Norðurjútlandi at koma heim í summar.

Aalborg er annars ein býur við at kalla øllum neyðugum møguleikum. Eitt av tingunum, sum tó hevur blómað í Aalborg síðstu árini, er ítróttarlívið, og her eiga vit føroyingar tveir leikarar á besta fótbóltsliðnum í býnum, AaB.



*Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen eru báðir partar av blómandi ítróttarlívinum í býnum. Teir spæla nevniliga báðir við besta fótbóltsliðnum hjá AaB, sum hevur ein góðan møguleika at tryggja sær heiðursmerki í Superliguni í ár*

### Jón Rói og Súni í AaB

AaB byrjaði fyri nøkrum árum síðani eitt skipað arbeiði í felagnum, har fótbóltur, hondbóltur og íshockey bleiv lagt undir eitt og sama felag. Ætlanin var at bøta um úrslitini í ítróttinum hjá býnum, og hetta arbeiðið hevur rættiliga borið frukt.

Fótbóltsfelagið, AaB, hevur í nógv ár verið at talt millum bestu liðini í Danmark. Teir hava vunnið nógv meistaraheiti, og bæði í 1995 og í 1999 eydnaðist teimum at fáa danska meistaraheitið til Aalborg.

Síðstu árini hevur úrtøkan tó verið heldur soltin hjá AaB. Okkurt árið hava teir akkurát megnað at hóra undan eini niðurflyting, men síðani felagið byrjaði við skipaða arbeiðnum fyri fáum árum síðani, er vend tó komin í aftur. Úrslitini eru blivin betri og betri, og í ár liggja teir og kempa um heiðursmerki.

Teir báðir føroysku landsliðsleikararnir, Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen, eru partar av AaB-liðnum í ár, og serliga Súni hevur verið nógv við eftir jól. Hann hevur spælt á høgra bakki hjá liðnum, sum í løtuni liggur á einum fjórða plássi í bestu donsku deildini. Munurin upp til OB á øðrum plássi er tó bert trý stig, nú tríggir dystir eru eftir at leika, so bæði Súni og Jón Rói hava ein møguleika at vinna heiðursmerki í Superliguni.

### Góð úrslit á øðrum frontum

Tað gongur tó ikki bara gott í fótbóltinum. Hondbólturin blómar eisini í býnum, og besta kvinnuliðið í hondbólti endaði á einum triðja plássi í grundspælinum í ár. Hetta gav teimum eitt pláss í hálvfinalunum, men her taptu tær fyri Viborg.

Menninir hava eisini verið væl við í ár. Teir endaðu á einum sjeynda plássi, og tí rukku teir ikki hálvfinalunum. Hetta er tó eitt gott úrslit hjá monnunum í Aalborg, sum hava eitt rættiliga ungt og spennandi lið.

AaB hevur eisini eitt rættiliga nýtt lið við í bestu íshockeydeildini í Danmark, men eisini her eru úrslitini góð. AaB endaði á einum triðja plássi í ár, og sostatt hava teir ognað sær bronsuheiðursmerkini her.

Aalborg eigur eisini eina ørgrynnu av øðrum góðum ítróttarfólki í býnum, og møguleikarnir fyri at íðka ítrótt eru eisini góðir. Aalborg hevur m.a. nógvar golfbanar bæði fyri tey, sum vilja hugna sær og fyri royndar golfspælarar. Harafturat eru feløg í býnum, sum skipað fyri súkklutúrum kring Aalborg, tú kanst fara fiskitúrar við bátum av havnarlagnum í Aalborg, og so eru strendur tætt við, har tú kanst royna teg í bæði vindsurfing, kitesurfing og á vatnski.



*Puntur nummar 6 av 23*




Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari